**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**
*Administration of Occupational Safety and Health*
Falkavegur 6 ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands
Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

*Skrásetingar nr.:*
**R-D008-2**

# Reglugerð um loyvisbræv sum kølimontørur

***Fyritreytir*.**

**§ 1.** Fyri at fáa loyvisbræv sum kølimontørur, skal umsøkjarin hava handverkaraútbúgving og hava kølitekniskar royndir og vitan, soleiðis sum tilskilað er í niðanfyristandandi.

***Avmarking*.**

**§ 2.** Loyvisbræv sum kølimontørur verður givið á tveimum stigum:

Loyvisbræv 1: galdandi fyri frysti- og køliskipanir við ≤50 kg av kølievnum í bólki 1.

Loyvisbræv 2: galdandi fyri frysti- og køliskipanir við > 50 kg av einum og hvørjum slagi av kølievnum.

***Handalig útbúgving*.**

**§ 3.** Umsøkjarin skal verað avlærdur sum kølimontørur ella avlærdur sum handverkari innan metalfakini.

***Loyvisbræv 1*.**

**§ 4.** Fyri at ogna sær loyvisbræv 1 sum kølimontørur, skal umsøkjarin í minst 2 ár hava starvast í góðkendum kølivirki og skal hann í hesari tíð undir ábyrgd og eftirliti hava arbeitt við umvæling, samanbygging og hava royndarkoyrt køliskipanir, somuleiðis sum hann eisini skal hava sett upp og sett í gongd slíka útgerð.

Umsøkjarin skal kunna vátta nágreiniligan kunnleika til CFCkølievni, handfaring av hesum evni eftir galdandi reglum og verða kunnugur við árini, hetta evni hevur á umhvørvið.

Eisini skal hann hava gjørt lógarásett eftirlit og lekaroyndir á køliútgerð við ≤ 50 kg av kølievnum í bólki 1.

Umsøkjarin skal standa eina próvtøku, har tað við einari skrivligari og munnligari - møguliga praktiskari roynd - verður eksaminera eftir "Lærebog for Kølemontører" (nýggjasta útgáva er altíð galdandi). Áheitan um próvtøku skal stílast til Maskinmeistaraskúlan.

***Lógarheimild:***
Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-D008-1 um nýtslu av frysti- og kuldaútbúnaðarinnrætningi frá 24. januar 1990.

***Útgivið fyrstu ferð:***
**12. juni 1995**

***Seinastu broytingar:***
**1. desember 1995**

Eftir áheitan fær umsøkjarin eitt umsøknarblað, sum skal útfyllast og sendast til Maskinmeistaraskúlan, saman við einari váttan frá arbeiðsgevaranum um, at umsøkjarin hevur fingið ta ásettu praktisku kølitekniskú útbúgvingina.

*2. Loyvisbræv.*

**§ 5.** Fyri at ogna sær loyvisbræv 2 sum kølimontørur, skal umsøkjarin hava loyvisbræv 1, og skal harumframt í minsta lagi 1 ár sjálvstøðugt, men undir eftirliti av einum góðkendum kølivirki, hava sett upp og sett í gongd køliskipanir við > 50 kg av kølievnum.

Umframt hetta skal hann hava arbeitt við køliskipanum við kølievnum í bólki 2.

Umsøkjarin skal standa eina próvtøku, har tað við einari skrivligari og munnligari - møguliga praktiskari roynd - verður eksaminera eftir "Lærebog for Kølimontører" (nýggjasta útgáva altíð galdandi). Áheitan um próvtøku skal stílast til Maskinmeistaraskúlan.

Eftir áheitan fær umsøkjarin eitt umsóknarblað, sum skal útfyllast og sendast til Maskinmeistaraskúlan, saman við einari váttan frá arbeiðsgevaranum um, at umsøkjarin hevur fingið ta ásettu praktisku kølitekniskú útbúgvingina.

***Víðkan av loyvisbrævi v.m.***

**§ 6.** Loyvisbræv 2 sum kølimontørur kann víðkast til eisini at umfata køliskipanir á skipum, um so er, at umsøkjarin undir eftirliti av einum góðkendum kølivirki hevur arbeitt við umvæling, upp-seting og sett í gongd køliskipanir á skipum.

Umsøkjarin kann, tá tær settu treytur í § 4 og § 5 eru uppfyltar, samstundis ogna sær Loyvisbræv 1 og 2 sum kølimontørur.

Víðkanin til, at loyvisbrævið eisini er galdandi fyri køliskipanum á skipum, krevur onga próvtøku, men bert váttaða ávísing.

***Útskriving av prógvi og gjald*.**

**§ 7.** Eftir at umsøkjarin hevur uppfylt tær framman fyri nevndu treytir, gevur Arbeiðseftirlitið loyvisbræv sum kølimontørur eftir tilmæli frá Maskinmeistaraskúlanum.

Gjald fyri umsókn til loyvisbræv sum kølimontørur, íroknað próvtøkugjald, tilsamans kr.1.000.- + MVG, skal ein hava við sær próvtøkudagin.

Gjald fyri eina møguliga praktiska roynd er kr. 500,- + MVG.

**Arbeiðseftirlitið**, 12. juni 1995.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)

# Ískoyti til reglugerð nr. R-D008-2

**Pensum til kølimontørpróvtøku viðv loyvisbrævi 1.**

Í ”Lærebog for Kølemontører” 5. útgáva 1990, verður lisið allur 1. partur (síðu 13 til síðu 231), undantikið hesi 3 stykkini:

| | |
|---|---|
| Ammoniak $NH_3$, | síðurnar 34-35 |
| Svovldioxyd $SO_2$, | síðurnar 35-36 |
| Methylchlorid $CH_3CL$, | síða 36 |

Harumframt skal lesast 2. partur av ”Lærebog for Kølemontører”:

| | |
|---|---|
| 2. kapittul | síðurnar 253-266 |
| 3. kapittul | síðurnar 267-278 |
| 7. kapittul | síðurnar 325-368 |
| 9. kapittul | síðurnar 385-387 |
| 11. kapittul | síðurnar 395-409 |
| 13. kapittul | síðurnar 447-471 |

Eisini er tað ein treyt, at góður kunnleiki er til nútímans automatikk, apparatur og verkstaðartøkni.

## Pensum til kølimontørpróvtøku viðv. loyvisbrævi 2.

Øll bókin ”Lærebog for kølimontører”, 5. útgáva 1990, skal lesast. Harumframt er tað ein treyt, at góður kunnleiki er til nýggjari automatikk, apparatur og verkstaðartøkni.

| SKJAL NR. 1 |
|---|
| Umsókn um góðkenning at reka tænastur innan frysti- og kølivirki. |

| | |
|---|---|
| Til: **Góðkenningarnevndina**<br>**v/Arbeiðseftirlitið**<br>**Fútalág 1B, Postboks 1134**<br>**FR-110 Tórshavn** | ____________<br>Dagfesting<br><br>____________<br>Skráseting |

Undirritaði søkir hervið um góðkenning at reka tænastur innan frysti- og kølivirki, herundir at gera lógarásett eftirlit og lekaroyndir, á nevnda útbúnað við ≤ 50 kg av kølievni í bólki 1.

| | | |
|---|---|---|
| Navn á montøri við loyvisbrævi 1: | | |
| Navn virkisins: | | |
| Eigari: | | |
| Bústaður: | | |
| Post nr.: | Býur/bygd: | Telf. nr.: |
| Undirskrift (virkiseigari): | | |
| Viðmerkingar hjá Góðkenningarnevndini: | | |

# SKJAL NR. 2.

Umsókn um góðkenning at reka tænastur innan frysti- og kølivirki.

| | |
|---|---|
| Til: Góðkenningarnevndina<br>v/Arbeiðseftirlitið<br>Fútalág 1B, Postboks 1134<br>FR-110 Tórshavn | ________________<br>Dagfesting<br><br>________________<br>Skráseting |

Undirritaði søkir hervið um góðkenning at reka tænastur innan frysti- og kølivirki, her-undir at gera lógarásett eftirlit og lekaroyndir, á nevnda útbúnað við > 50 kg av einum og hvørjum slagi av kølievnum.

| | | |
|---|---|---|
| Navn á montøri við loyvisbrævi 2: | | |
| Navn virkisins: | | |
| Eigari: | | |
| Bústaður: | | |
| Post nr.: | Býur/bygd: | Telf. nr.: |
| Undirskrift (virkiseigari): | | |
| Viðmerkingar hjá Góðkenningarnevndini: | | |